# TILTØK

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli. Møti við barnaansing kl. 18 við Honnu og ungum damum. Drekkamunnur aftaná. Hjartaliga vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin verður morgunmøti við breyðbróting kl. 11.00.
Mánakvøldið opið hús fyri ung kl. 20.00.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Snorra og Turid Brend. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20.00, Tekin tíðarinnar v/ Øssur Kjølbro. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mánakvøldið kl. 19.30. Allar kvinnur vælkomnar.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Kajberg Davidsen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Elim, Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli. Á møtinum kl. 18 luttøka úr Klaksvík við talu og sangi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli. Barnakórið venur aftaná. Sunnukvøldið kl. 18 Sang- og vitnimøti.

**Siloa, Fuglafirði**
Fundarøðin undir heitinum »Kristus frelsir til fulnar« heldur fram í kvøld kl. 20 og endar sunnukvøldið kl. 18. Svenning av Lofti talar.
Í kvøld syngur sangbólkurin »Salt« og sunnukvøldið sangkórið í Siloa.
Barnamøti er í dag kl. 17.
Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Maibritt og Kaj Otto Frederiksberg.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Jan Jacobsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Samkoman Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Tummas Jacobsen, fyristøðumanni. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow-møti**
verður í Hæddini í Runavík leygardagin 12. februar kl. 15.00. Vit fáa vitjan av Helen Joensen, allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Getsemane, Klaksvík**
Leygardagin kl. 15 Bíbliutími og kl. 20.30 Ungdómsmøti við Sannu Hammer.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Leygardagin kl. 21 Opið hús. Torbjørn Láadal og co. luttaka.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Thomas Juul Askham.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Óla Poulsen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Møtir í Hermon í Norðdepli**
Fundarrøðin við Poul Færø og fl. verður fríggja- og leygardagin kl. 20 og sunnudagin kl. 18. Sangur við MC og fleiri. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Leygarkvøldið kl. 18 Bønarløta.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 18 Bønarløta, kl. 19 savnast ungdómurin frá 7. fl. og eldri.
Missiónsvikan verður 17.-20. februar. Hjartaliga vælkomin.

**Samljóð í Skopun**
Møtirøðin við Viggo Wilhelmsen heldur fram í Samljóð í Skopun leygarkvøldið kl. 19.
Sunnudag morgunmøti kl. 11, kvøldmøti kl. 19. Luttakandi við sangi eru Teddy Petersen. Jens Lisberg, Dansibólkur úr Kelduni og Heini Lützen.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Sands missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Manskórið syngur. Øll eru vælkomin.

**Frá Café One Way, Tvøroyri**
Mánakvøldið kl. 19-20.30 er barnahugni fyri børn, 10-12 ár.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
**Missiónsvika**
Leygarkvøldið kl. 20 Møti v/ Regin Høgnesen, sangluttøka norðanfjørðs.
Sunnudagin kl. 14 Familjumøti og kl. 18 Møti v/ Torleif Johannesen, sjómanstrúboðara. Porkeriskórið syngur.
Innsavnan verður til húsið sunnukvøldið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti, Eingrím Holm talar. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti.

**Vitnið, Hvalba**
Oyggjamøti verður leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. Sangkórið luttekur. Øll eru vælkomin.

**Betania Sunnba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20.00.

**Felagið Tórshavn**
Sunnudagin 13. februar verður gongutúrur av Velbastað til Havnar. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæðir og drekkamunn við. Tilmelding.

**Tilhaldið**
***í Tórsgøtu 21, tlf. 316491***
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 14. februar:*
kl. 10-16.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-16 Havnaprát, Birgar V. Johannesen
kl. 14-17 Kortspæl, landastrok, telving o.o. spøl.Tilm. til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491
*Týsdagin 15. februar:*
kl. 10.00–11.30: Sangur, Flemming og Benny Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00: Málprát, Jóhan H. W. Poulsen
*Mikudagin 16. februar:*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestir.
Tilm. 316491
kl. 15.00 Framsýningin »Greivadømi« 73 myndir hjá Karl Einarsson Dunganon í Norðurlandahúsinum
*Hósdagin 17. februar:*
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Enskt talumál, Ásmundur V. Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14.00–16.00: Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagin 18. februar*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
*Mánadagin 14. februar:*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
*Týsdagur 15. febr.:*
Boccia.
*Mikudagur 16. febr.:*
Prát, sangur og spurningar
*Hósdagur 17. febr.:*
Myndaveving fyri áhugað v. Rannvu Gøte.
*Fríggjadagur 18. febr.:*
Vit vitja framsýningina hjá Reyða Krossi Føroya í hølunum hjá Tøting í Gøtu. Verða eisini víst runt á virkinum. Høvi er at keypa sær ein drekkamunn. Vit møtast í Fløvanum kl. 15.00 og fylla bilarnar.

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Eldrafelagið Borgin**
Hugnaløta við M. C. Restorff verður í Felagslonini í Fuglafirði týskvøldið 14. februar kl. 20. Ársaðalfundurin byrjar kl. 19 sama kvøld og sama stað.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 3320534 ella ein av nevndarlimunum.

**Tilhaldi Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl.- 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks.
*Mánadagin 14. februar:*
Vit hugna okkum saman við einum góða bita og sangi
*Mikudagin 16. februar:*
Mogens Nielsen undirvísir í talvi.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Eliaskirkjan.**
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 8 min. at ganga frá Hovedbanegården, 4 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1A, 6A, 14, 15 og 28 steðga nærhendis.
Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995 ella Albin Johannessen, tlf. 32 88 68 79.
E-mail: pr@eliaskirkjan.dk
www.eliaskirkjan.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 19. februar kl. 14.00 giftast í Miðvágs kirkju Irdi Lið Johansen og Jørgen Jónsvein Gaardlykke, Miðvágur. Vælkomst verður í heiminum frá kl. 19.00.

Leygardagin 26. februar kl. 10.00 giftast í Rituvíkar kirkju Hanna Olsen, Rituvík og Ásmundur Hansen, Søldarfjørður. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 16.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, verða biðin um at ringja á tlf. 442036, 254250, 504970 ella 441396, 447774. Tilmeldingarfreistin er 14. februar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 5. mars kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Frida Mellemgaard og Jens Kristian Hansen, Tórshavn. Veitslan verður í B36 húsinum kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið, verða biðin um at siga frá á tlf. 322324, 522324 ella 315609 áðrenn 18. februar.

## SILVURBRÚDLEYP

22. mars hava hjúnini Sólmay og Heini Jón Jóhannesen, Leirvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin tann 23. mars kl. 19.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið, verða biðin um at siga frá, innan 15. mars á tlf. 443210 ella 213155.

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Og mitt ímillum hinar elstu stóð tað lamb, sum var tað dripið og tað kom og tók bókina úr høgru hond hansara, sum í hásætinum sat.*
***Jóhs. Opinbering 5 6-7***

Í bíbilskum myndabókum síggja vit mangan lambið sita ella standa omaná bók við sjey innsiglum, og tá er hugsa um hetta, sum vit í morgun hoyrdu úr Opinberunarbók Jóhannesar.

Til eru eisini myndir, hvar lambið stendur á einari hædd, hvaðani fýra løkir renna. Hetta er tekin fyri evangelistarnir fýra, tí boðskapur teirra eigur hiðanifrá, sum lambið stendur, at renna út um ta víðu verøld. Men hetta minnir okkum eisini á stórárnar fýra, sum runnu úr Paradísinum, soleiðis sum sagt er frá í Fyrstu Mósebók, tá menniskjuni enn vóru í Edens hava. Árnar fýra, ið lívgaðu jørðina. Leggjast kann afturat, at talið fýra er tekin heimsins.

Tá vit í morgun hava talað um lambið, liggur mær nær at nevna hirðan eisini. Hirðin er eitt av elstu Kristusmerkjunum. Í katakombunum er mynd frá triðju øld, har unglingi ber lamb á herðunum, meðan hann lyftir høgru hond at vælsigna við. Í kristnum bókmentum hevur hirðin hirðastavin í hendi sær, ella hirðafloytuna, at kalla fylgið saman við.

Vit eiga, sum kristin fólk, eisini eitt myndamál, sum boðar gleðiboðskapin um frelsaran og tað hann vil gera fyri okkum.

Við deyða sínum, tá Kristus á krossinum verður offraður fyri syndir heimsins, verður hann offurlambið, hvørs blóð reinsar frá allari synd. Tí lesa vit eisini í Opinberingini, at »verdugt er lambið hitt dripna at fáa máttin og ríkdóm og vísdóm og kraft og heiður og dýrd og signing«. Hetta er føstunnar boðskapur til ævigar tíðir.

Amen

**Heri Joensen**